LM-068/2024

umhvørvisstovan

Fylgiskjal 5.

Løgmálaráðið

Argir hin 13. januar 2025
Málsnr.: 25/00875-2
Tykkara málsnr.: 23/23254
Málsviðgeri: Stein Fossá

**Viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni til uppskot til ll. um tænastugjald á tóm býli**

Talvan niðanfyri vísir eitt yvirlit frá 2022 yvir hvussu nógvir bygningar, sum eru skrásettir sum býli í bygningsskránni, standa tómir. Talvan vísir sostatt ikki tal av búeindum, men einans tal av tómum húsum.
Um mánaðargjaldið fyri tóm hús er 673 kr., sæst eisini í talvuni hvussu stór mánaðar- og árliga inntøkan er hjá ymsu kommununum.

| Kommuna | Tóm hús | Mðr. Gjald | Árl. Gjald |
|---|---|---|---|
| Kunoyar | 12 | 8.076 | 96.912 |
| Hovs | 18 | 12.114 | 145.368 |
| Hvannasunds | 18 | 12.114 | 145.368 |
| Fámjins | 19 | 12.787 | 153.444 |
| Skúvoyar | 20 | 13.460 | 161.520 |
| Viðareiðis | 28 | 18.844 | 226.128 |
| Fugloyar | 30 | 20.190 | 242.280 |
| Porkeris | 30 | 20.190 | 242.280 |
| Skopunar | 36 | 24.228 | 290.736 |
| Skálavíkar | 42 | 28.266 | 339.192 |
| Nes | 43 | 28.939 | 347.268 |
| Eiðis | 46 | 30.958 | 371.496 |
| Húsavíkar | 47 | 31.631 | 379.572 |
| Sumbiar | 53 | 35.669 | 428.028 |
| Vestmanna | 54 | 36.342 | 436.104 |
| Fuglafjarðar | 55 | 37.015 | 444.180 |
| Eystur | 57 | 38.361 | 460.332 |
| Hvalbiar | 65 | 43.745 | 524.940 |
| Sjóvar | 65 | 43.745 | 524.940 |
| Kvívíkar | 90 | 60.570 | 726.840 |
| Sands | 90 | 60.570 | 726.840 |
| Vágs | 105 | 70.665 | 847.980 |
| Sørvágs | 132 | 88.836 | 1.066.032 |

LM-068/2024



| | | | |
|---|---|---|---|
| Vága | 138 | 92.874 | 1.114.488 |
| Tvøroyrar | 151 | 101.623 | 1.219.476 |
| Sunda | 197 | 132.581 | 1.590.972 |
| Runavíkar | 201 | 135.273 | 1.623.276 |
| Klaksvíkar | 255 | 171.615 | 2.059.380 |
| Tórshavnar | 477 | 321.021 | 3.852.252 |
| **Tilsamans** | **2574** | **1.732.302** | **20.787.624** |

Umhvørvisstovan hevur hesar viðmerkingar til uppskot til ll. um tænastugjald á tóm býli:

1.
Lógin fevnir um øll býli, har eingin er skrásettur at búgva sambært *Landsfólkayvirlitinum.* Avbjóðingin við hesum er, at bygningsskráin ikki hevur heimild at fáa upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum, og at heimild heldur ikki í løtuni er í verandi uppskoti til *kunngerð um bygningsskrá.*. Heimildin er ein fyritreyt fyri, at bygningsskráin kann staðfesta hvørt ein búeind er tóm.

2.
Um bygningsskráin fær atgongd til landsfólkayvirlitið, ber til at finna adressur og matr.nr. til tóm býli í bygningsskránni, men um Umhvørvisstovan eisini skal lata kommununum ein lista við eigarum av hesum tómu býlum, krevst heimild hjá *bygningsskránni* at heinta eigaraupplýsingar úr *tinglýsingini.* Upplýsingar úr tingbókini eru ikki tøkar "system to system". Eigaraupplýsingar eru tøkar á tinglysing.fo.

3.
Sambært lógaruppskotinum kann tænastugjald krevjast frá eigarum av býlum. Viðmerkjast skal, at tað kann vera trupult at staðfesta, hvør eigarin av einstøkum býlum er, av tí at eigarar sambært tingbókini ikki í øllum førum er eintýðugt eyðmerktir við p-tali ella v-tali. Í fleiri førum er einans skrásett eitt navn og møguliga ein føðingardagur. Eigarar kunnu millum annað vera eitt annað matr.nr., eitt felag ella ein deyður persónur. Víst verður eisini á, at eigaraupplýsingar í tingbókini ikki í øllum førum eru dagførdar. Tinglýsingardátur eru almennar, men eru ikki tøkar "system to system". Talgild samband er ikki millum tinglýsingina og bygningsskránna.

4.
Núverandi bygningsskrá er ikki gjørd fyri at innkrevja tænastugjøld, men fyri at fáa eitt hagtalsyvirlit yvir bústaðareindir og tóm hús í landinum. Um bygningsskráin skal brúkast til at innkrevja tænastugjøld, verður neyðugt hjá kommununum at góðskutryggja upplýsingarnar.

Vinarliga

Stein Fossá

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo